# Catch me if you can

Leonardo DiCaprio spælir høvuðsleiklutin í hesum filminum saman við Tom Hanks. DiCaprio spælir ungi Frank Abagnale Jr, sum í einum aldri av 16 árum gerst stórsvindlari. Hann megnar at snýta seg til arbeiði sum flogskipari, lækni og sakførari, og við at forfalska kekkar »forvinnur« hann sær milliónir av dollarum, umframt lønirnar hann fær fyri arbeiði hjá sær.

Tom Hanks er FBI eftirlitsmaðurin Carl Hanratty. Hann ger tað til sítt lívsverk at fanga unga svindlaran. Hann er tann vanliga myndin av einum politisti. Konan er farin frá honum við dóttrini, og hann er einsamallur hvørja jólaaftan.



Frank klárar við sjarmu og hegni at liva sum stórsvindlari í trý ár. Tá hevur hann snýtt seg til fýra milliónir dollarar, og havt eitt luksus lív sum fáur.

Filmurin gongur fyri seg í 60´unum í Amerika. Steven Spielberg hevur stjórnað filminum, men synd er at siga, at hann er nakað meistaraverk.

Í síðuleiklutunum finna vit kendar mans sum Martin Sheen og Christopher Walken, og er tað serliga leikluturin hjá tí seinna, sum verður heilt ótrúliga væl spældur.

Sum heild er filmurin góður. Men tó. Hann er hálvan triðja tíma til longdar, og kann til tíðir tykjast eitt sindur langdrigin. Onki veruligt hæddarpunkt er í filminum, og ein kann lætt koma til at keða seg. Um tú hevði sovnað ein tíma mitt í filminum, so kann ein nú ikki beinleiðis siga, at tú hevði mist tráðin tí hann gongur alla tíðina út uppá tað sama. Hanratty skal fanga Abagnale.

Ilt er at siga, hvør er »the good guy« í filminum. Sjálvt um



Leonardo DiCaprio er ein stórsvindlari, so fær hyggjarin eina ávísa sympati fyri honum, og vónar, at hann ikki verður fangaður. Men hetta ger eisini, at tað eru ongir »bad guys«.

Filmurin er góður í støðum. Hann er eisini undirhaldandi í støðum. Og álvarsamur.

Leonardo DiCaprio spælir ein av sínum bestu leiklutum síðani A Basketballer´s Diaries og What´s Eating Gilbert Grape, men Tom Hanks megnar als ikki at koma upp á sín Forrest Gump skala. Men leikluturin hjá honum leggur nú heldur ikki beinleiðis upp til nakað stórspæl.

Filmurin er ok, kunnu vit siga. Tú fert nú ikki út aftur úr biograf-hølunum við tí kensluni av, at tú angrar at tú fórt í biograf. Men hetta er nú tá alt kemur til alt ein persónssak.

**Fakta um <Catch me if you can>**

| | |
|---|---|
| leikarar: | Leonardo DiCaprio, Tom Hanks, Christopher Walken, Martin Sheen, Amy Adams o.o |
| Leikstjórn: | Steven Spielberg |
| longd: | 141 min. |
| stað: | Havnar Bio, um tú ert 12 ár ella eldri |

## Húsligi sjónvarpsmaðurin Tórður Mikkelsen:



**Hvat slag av uppvaskisápu nýta tit heima við hús?**
– Tað er hatta føroyska frá Kemilux. Sitrónuppvask. Og uppvaskibustin er hvít.

**Hvussu ofta gert tú mat um vikuna?**
– Tað er ein góður spurningur. Tað veldst um, hvat er at gera mat. Er tað at kóka ræstan fisk til døgurða at gera mat, so má tað liggja um einar tvær ella tríggjar ferðir um vikuna, haldi eg.

**Hvussu longi kókar tú eplir?**
– Tað plagar at vera um hálvan tíma.

**Og eitt egg?**
– Nú er tað so, at eg vil bert hava bleyttkókað egg, so eg kóki tey í tríggjar minuttir. Eg plagi at kóka tvey, og veitst tú hvat, mær dámdi best fyrr? Mær dámdi sera væl at koyra skalið av og so koyra eggið í munnin í einum. Men tað geri eg ikki longur, tí hvat um nú ein ungi er í? Tá fyrst tílíkir tankar hava sett seg í høvdið, ber illa til at lata vera við at hugsa um tað.

**Nær heldur tú sjálvur, at tú ert ordiliga húsligur?**
– Tað er tá ið eg eri í góða lagnum og dustsúgvi og vaski gólv og trappur. Tá avlasti eg konuna eitt sindur, og ein er altíð so fegin, tá ein er liðugur. Tá tað er gjørt.

**Hvussu nógv bakipulvur nýtir ein vanliga til 500 gram mjøl?**
– Eg havi ongantíð bakað, tað er ikki eg, so tað veit eg ikki. Tað besta, sum eg veit at gera er at gera sósir av ymsum slag og smakka tær til.

**Hvat hevur tú gjørt, tá ið tú hevur gjørt okkurt avbera lekkurt?**
– Ja…tað er eisini ein góður spurningur…mítt serøki er sum sagt at gera sósir. Eg standi ikki og geri so øgiliga nógv burtur úr eini máltíð, tað vil siga, at eg geri ikki fleiri rættir. Men mær dámar væl at steikja kjøt, grindabúff ella okkurt líknandi. Men ikki at gloyma, mín æra er at gera eina sós, sum simpulten sigur BINGO.



# Skúlatilboð fyri ung brekað væl móttikið

**Allir flokkar á tingi tóku væl ímóti uppskotinum at seta á stovn ein skúla fyri ung við breki. Sostatt er líkt til, at ung við serligum tørvi, ið fara úr fólkaskúlanum, fáa eitt tilboð eftir summarferiuna**

SKÚLATILBOÐ
*Ingi Rasmussen*

Ung við breki hava ongastaðni at fara, tá tey eru liðug við fólkaskúlan.

Hetta hevur verið til stórt fortreð hjá teimum, ið varða av, og tí hava tey heitt á myndugleikarnar um at skipa soleiðis fyri, at tey fáa okkurt mennandi tilboð. Beint upp undir evstamarkið hjá løgtinginum legði Annlis Bjarkhamar, fráfarin landsstýriskvinna, uppskot fyri tingið um skúlatilboð til ung við breki.

Endamálið við nýggja skúlatilboðnum, sum skal byrja í august, er at menna tey ungu til eitt sjálvstøðugt lív eftir lokið skúlaskeið. Høvuðsdenturin skal leggjast á upplæring í praktiskum arbeiði, soleiðis at næmingarnir fáa betri møguleika at seta føtur undir egið borð.

Uppskotið fekk eina hjartaliga móttøku frá øllum tingfólkum, ið høvdu orðið, tá tað var til fyrstu viðgerð seinnapartin mánadagin.

Katrin Dahl Jakobsen, framsøgukvinna Javnaðarfloksins, segði flokkin taka fult og heilt undir við tankanum.

– Vit eiga at stuðla hesum ungu í at virka heldur enn at vera ansað. Vit eiga at geva teimum eitt høvi at fáa økt lívsvirði og skapa fortreytir fyri, at tey kunnu gerast ein integreraður partur av samfelagnum, segði Katrin Dahl Jakobsen.

Talsmaður Fólkafloksins, Jákup Mikkelsen, helt somuleiðis uppskotið vera sera áhugavert og segði flokkin avgjørt taka undir við tí.

– Sum víst hevur verið á, so hevur tað verið ein trupulleiki at útvega tilboð til ung við breki, tí tey eru fallin fyri aldursmarkinum, og tí vilja vit viðgera hetta við vælvilja, segði Jákup Mikkelsen.

Hann vísti kortini á, at tørvurin er nógv størri enn teir átta næmingarnir, sum í fyrstu atløgu fáa tilboðið. Og hann vísti eisini á, at neyðugt er at hugsa um, hvat skal henda teimum, aftaná tey trý árini eru farin.

# Eingin fráboðan fer til ST frá løgmanni

**Løgmaður heldur onga orsøk vera at boða Sameindu tjóðum frá, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Tað ger Anfinn Kallsberg greitt í svari til Kristinu Háfoss**

SJÁLVSAVGERÐ
*Ingi Rasmussen*

Spurningurin um at boða Sameindu tjóðum frá, at føroyingar eru tjóð við sjálsavgerðarrætti, er jarðaður.

Tað kann lesast í svarinum hjá Anfinni Kallsberg løgmanni upp á fyrispurning frá Kristinu Háfoss løgtingskvinnu.

– Viðurskiftini millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina eru góð og greið í dag. Eg havi fingið lyfti frá danska forsætisráðharranum, at Føroyar fáa ta skipan, vit ynskja. Í løtuni bendir einki á, at danski forsætisráðharrin ætlar sær at víkja frá lyfti sínum. Við hesum í huga haldi eg, at sum politisku viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru í dag, er einki, sum talar fyri at senda eina fráboðan til ST um stjórnarstøðu Føroya, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

Løgmaður ger annars greitt, at hvørki samgonguskjal ella nøkur løgtingssamtykt ásetir, at ST skal boðast frá løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroyar fólk, ið staðfesti, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at tað broytt nakað við einari fráboðan til ST, tí viðurskiftini millum landsstýrið og donsku stjórnina eru góð í dag. Viðvíkjandi altjóða felagsskapum og útlondum høvdu neyvan verið nakrar broytingar heldur, tí at samsvarandi altjóðarætti høvdu uttanríkisviðurskifti Føroya framvegis verið umsitin av Danmark.

# Ritgerðarkapping á Fróðskaparsetrinum

**RITGERÐAR-KAPPING**
*Fróðskaparsetrið*

Fróðskaparsetur Føroya hevur tey seinastu 30 árini skipað fyri ritgerðar- og savningarkappingum. Seinasta kappingin var um gamlar bøkur, og hana vann Elin Mortensen úr Havn.

Evnið í ritgerðarkappingini 2003-04 er:

Tá ið gentur og dreingir gerast vaksin

Sóknast verður eftir lýsingum av skiftissiðum fyrr og nú í sambandi við, at gentur og dreingir verða vaksin. Hvørjar vóru og eru tær týdningarmiklu hendingarnar og broytingarnar, sum vekja ans og viður--kenning? Vit vita, hvussu rørd foreldur vóru fyrr, tá ið dreingirnir veiddu vaðanskalvan. Og hvussu errin tey eru nú t.d., tá ið sonurin skjýtur fyrsta málið. Nær eru foreldur rørd og errin av døtrunum?

Hvørjar hendingar vaktu og vekja ans í uppvøkstrinum hjá gentum og dreingjum? Hvat varð og verður gjørt burtur úr, tá ið gentur og dreingir fara um avgerandi mørk í uppvøkstrinum?

Talan kann vera um siðir í sambandi við skyldur, heimildir, ábyrgd, virðing, sum fylgja við, tá ið børn fara um markið, ið ger tey til vaksin fólk. Skiftið sæst ofta aftur í klædnabúna og øðrum við-víkjandi útsjónd, hárgreiðslu og atburði yvirhøvur. Eru onnur eyðkenni?

Tey sum lata kappingini tilfar gera sjálvi av hvørjum tíðarskeiði tey arbeiða við. Tað kunnu vera egnar royndir ella ymiskt, sum tey hava hoyrt frá eldri fólkum.

Freistin at lata inn tilfar til kappingina er 15. mars 2004. Fólk eru vælkomin at seta seg í samband við Fróðskaparsetrið um okkurt er at spyrja um, annaðhvørt skrivliga ella við at ringja. Bústaðurin er: Setursskrivstovan, J. C. Svabos gøta 14, tlf. 35 25 00. Eisini ber til at senda teldubræv á setur@setur.fo Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomna tilfarið og virðislønir verða latnar fyri bestu úrslitini.

# 120-manna ljómlið í Fuglafjarðar Kirkju og í Norðurlandahúsinum næsta vikuskifti



**KONSERT**
*Tíðindaskriv*

Í vetur hava fyrireikingar verið gjørdar til framførslu av enn einum av tónleikasøgunnar mætu verkum fyri kór, solistar og orkestur. Talan er um oratoriið "Elias" eftir týska tónaskaldið Felix Mendelssohn-Bartholdy (1809-1847).

Fáur hevur dugað at handfara tónlistina, bæði ta vokalu og ta instrumentalu, so fullbúgvið sum Mendelssohn, og við hesum sínum seinasta stórverki - hann doyði árið eftir bert 38 ára gamal - vann hann sær sæti sum tónaskald millum tey allrafremstu. Hugtakandi í sínum melodiska og harmoniska ríkidømi og skakandi við sínari dramatisku megi er "Elias" t.d. tað tónaverkið, sum eftir Händels Messias verður framført mest í Onglandi.

Innihaldið í verkinum er bíbliusøgan um profetin Elias, og um hvussu hann í einari hungurstíð stríddist móti avgudinum Baal og hansara prestum og við Harrans hjálp vann lemjandi sigur á teimum.

Tað var Havnarkórið, ið tók stig til hesa frumframførslu í Føroyum; men kórið telur hesaferð eisini sangarar úr øðrum kórum - saman við kórsangarum úr Danmark eini áttatifimm í tali. Í 30-manna orkestrinum spæla mest lærarar og næmingar í føroyska musikkskúlanum, men orkestrið fær eisini stuðul frá øðrum m.a. professionellum tónleikarum úr Danmark.

Solistar eru Berghild Poulsen, sopran, Elsa Súsanna Dalsgaard, alt, Garðar Cortes (yngri) tenorur og Trygve Bjerke, bassur; men eisini Arina Bischoff, Unn Patursson og Randi Hansen leggja solistiska rødd til.

Tað er kendi danski tónlistamaðurin Steen Lindholm, sum stjórnar framførslunum í Fuglafjarðar Kirkju leygardagin 15. mars kl. 17.00 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin 16. mars kl. 16.00.